

www.oljan.fo

**Jan Müller** 15 - 01 - 2012

# Kina vil hava meira olju úr Saudi Arabia

Kina leggur nú tryst á Saudi Arabia fyri at loyva kinesiskum íløgum í veldugu olju- og gassgoymslurnar í landinum. Tað skrivar kinesiska tíðindastovan Xinhua sambært Ritzau. Kinesiski forsætisráðharrin Wen Jiabao vitjar í hesum døgum fleiri lond í Miðeystri, og leygardagin segði hann við saudisarabiska knúnprinsin Nayef, at Kina er áhugað í at gera íløgur í havnir, jarnbreytir og annað undirstovukervi í arabiska kongaríkinum. Saudi Arabia er longu mest týðandi innflytarin av olju hjá Kina. Fyri Wen Jiabao hevur tað alstóran týdning at kunna varðveita hesa trygdina, ikki minst tá innflutningurin úr Iran kann verða steðgaður orsakað av iranska kjarnorkupolitikkinum og sanktiónum úr Vesturheiminum. Bæði Kina og Saudi Arabia eru í eini týðandi menning, og her eru stórir møguleikar fyri samstarvi. Bæði londini eiga at leggja seg eftir at víðka um samstarvið bæði innan ráolju og náturgass segði kinesiski forsætisráðharrin Wen Jiabao. Iranski oljuútflutningurin til Kina er komin undir trýst frá nýggjum amerikanskum sanktiónum. Obamastjórnin sær fegin, at Kina fylgir USA og minkar um upphæddirnar, sum verða rindaðar fyri iransku oljuna. Fleiri lond í Vesturheiminum bera ótta fyri, at Iran er í ferð við at framleiða kjarnorkuvápn. Hesum vísa iranar aftur og siga, at teirra kjarnorkuútbygging er til friðalig endamál.

